

## PROFILURIN

*Landliðsleikarin Christian Høgni Jacobsen hevur avgjørt verið størsti profilurin fyrru hálvu av landskappingini, og er eisini helst orsøkin til at NSÍ heldur summarferðiu á fyrsta plássinum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## BESTI DYSTURIN:

# ÍF - NSÍ 3-5



Tað hava verið fleiri góðir og málríkir dystir í ár, men ein dystur stendur eftir sum tann besti, nevniliga dysturin millum ÍF og NSÍ í Fuglafirði. Tað var fríggjakvøldið 28. mai, at ÍF sum oddalið í Vodafonedeildini tók ímóti NSÍ, sum lá á einum triðja plássi. Dysturin byrjaði við at Nenad Saric legði ÍF á odda longu eftir tveir minuttir. Síðani javnaði NSÍ, áðrenn ÍF kom upp á 3-1. Tá hildu tey flestu, at ÍF hevði tryggjað sær enn eitt vikuskifti sum oddalið. Men tá gjørdi Pauli Poulsen, venjari hjá NSÍ, ein tvífalda útskifting. Teir, ið komu inn vóru Debes Danielsen og Károly Potemkin. Debes gjørdi um seg beinanvegin og minkaði um munin. Síðani javnaði Justinius R. Hansen og løtu seinni legði Jann Ingi Petersen NSÍ á odda. Í evstu løtu staðfesti Károly Potemkin sigurin.

Dysturin helt fram eftir at dómarin, Eiler Rasmussen, hevði bríkslað fyri seinastu ferð. Tað endaði við at Poul og Kaj Ennigarð og Karoly Potemkin fingu reytt kort. Dysturin hevði alt: gott spæl, nógv at spæla um, dramatikk og ikki minst nógv mál.

# 1. HÁLVU **LIÐIÐ**

vodafone **deildin** 2010

*Ítróttarredaktiónin úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá øllum Vodafone-dystum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

? Tølini vísa hvussu ofta leikarin hevur verið á Vikuliðnum hjá Sosialinum

## Føroyska **Vodafonedeildin**

vodafone deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 14 | 9 | 2 | 3 | 30 | 15 | +15 | 29 |
| 2 | HB | 14 | 8 | 4 | 2 | 28 | 18 | +10 | 28 |
| 3 | ÍF | 15 | 7 | 4 | 4 | 27 | 26 | +1 | 25 |
| 4 | EB/Streymur | 14 | 6 | 4 | 4 | 24 | 19 | +5 | 22 |
| 5 | B36 | 14 | 5 | 6 | 3 | 24 | 18 | +6 | 21 |
| 6 | Víkingur | 14 | 4 | 6 | 4 | 23 | 23 | 0 | 18 |
| 7 | B68 | 14 | 4 | 3 | 7 | 21 | 26 | -5 | 15 |
| 8 | B71 | 14 | 3 | 4 | 7 | 13 | 24 | -11 | 13 |
| 9 | AB | 15 | 1 | 7 | 7 | 18 | 28 | -10 | 10 |
| 10 | FC Suðuroy | 14 | 2 | 4 | 8 | 15 | 26 | -11 | 10 |